# Metstórt tal av lesandi í Íslandi

Fleiri enn 20.000 næmingar byrjaðir á universiteti í ár. Tað er ikki óvanligt, at fólk fara undir víðari lesnað í minni góðum tíðum. Íslendski búskapurin er ikki væl fyri í løtuni. 100 íslendskar krónur eru ikki meira verdar enn 6 krónur í okkara peningi í dag. Men talið av lesandi slær hinvegin øll met hetta lestrarárið. Fleiri enn 20.000 lesandi eru innskrivað á hægri lærustovnar í ár, skrivar heimasíðan bkv.fo. Tað búgva eini 300.000 fólk í Íslandi, tvs, at heili 15% ganga á hægri lærustovni. Tá eru tey mongu sum fara undir miðnámsútbúgvingar og aðrar verkligar útbúgvingar ikki tald við.



# Gongur væl við Sands skúla

Arbeiðið við at gera nýggja skúla á Sandi gongur gott. Teir verða lidnir at seta skilaveggir upp seinni í vikuni. Hiti er eisini komin í bygningin. Arbeiðið sær út til at ganga sína gongd, og skúlin verður væntandi liðugur til ásettu tíðina, skrivar heimasíðan bkv.fo. So er eftir at innrætta húsið. Hetta arbeiðið ger Bulur ikki sjálvur. Sands kommuna skal, saman við lærarum, standa fyri at fáa húsið innrættað, so skúlin verður klárur at taka í nýtslu eftir nýggjár.

# Sár eru trekkplástur

**Sár og heilsuverk hoyra saman. Heili 400 starvsfólk innan heilsuverkið hava teknað seg til evnisdagar um sárviðgerð mikudagin og hósdagin**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Ein lítil breyðmoli á lakinum hjá einum seingjarliggjandi sjúklingi kann elva til ólekjandi og pínufull sár. Og sár, sum ikki fáa røttu røktina og viðgerðina, kunnu hava við sær bruna, fepur, amputatiónir og í ringasta føri deyða.

Hetta er helst eisini orsøkin til, at heili 400 heilsustarvsfólk hava teknað seg til evnisdagarnar um viðgerð av sárum veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum mikudagin og hósdagin.

Tað er danska fyritøkan Athena Healtcare sum kemur til landið at vísa nýggjastu viðgerðartilboðini, umframt at danski serfrøðingurin Bo Jørgensen, yvirlækni á Videnscentret for Sárhelen á Bispebjerg Hospital, fer at halda fyrilesturin: Sárets ABC. Marjun Vilhelm, ið er sjúkrarøktarfrøðingur við sergrein í sárviðgerð, og sum arbeiðir í heimarøktini í Havn, tekur samanum og greiðir frá um, hvussu sár kunnu fyribyrgjast og um týdningin av tvørfakligum samstarvi á økinum.

### Sár eru sjúkueyðkenni

Hon sigur við Sosialin, at tey høvdu ikki roknað við, at so nógv fólk fóru at tekna seg, men, at tey sjálvandi eru sera fegin um góðu undirtøkuna. Hon heldur, at hetta er eitt tekin um, at áhugin fyri økinum er stórur og at tørvur er á at gera meira við tað her í Føroyum.

- Vit mugu seta fokus á sár í føroyska heilsuverkinum, tí vit hava serfrøðingarnar, men økið er ikki samskipa, sigur Marjun Vilhelm.

Hon forklárar víðari, at sár eru symptom upp á aðrar sjúkur, tað kunnu vera áraknútar, æðrakálking, sukursjúku, skurðsár og trýstsár.

- Tað er alt um at vera, at sjúklingar við sárum fáa røttu røktina. Vandin við sárum er, at um tey fáa ikki røttu viðgerð, so versna tey. Í síðsta enda kunnu tey hava við sær amputatiónir, at fólk gerast avlamin, fáa infektiónir og í ringasta føri til deyða, endar hon.

# Arbeiðs gevari noktar at rinda bussførara frítíðarløn

**Føroya Arbeiðarafelag hevur stevnt Suðuroyar Bygdarleiðum og í øðrum lagi Poul Johannes Poulsen fyri ikki at rinda einum bussførara frítíðarløn, hóast hetta er lógarkrav umframt eftirløn, trygging og limagjald, sum eru ásett í sáttmála við Føroya Arbeiðsgevarafelag**

TRÆTA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Tilvildarlig mynd*

Í alt er talan um góðar 15.000 kr í frítíðarløn. Oman á hetta koma fleiri túsund kr afturat í trygging, eftirløn og limagjaldi til fakfelagið.

Samtak boðar í tíðindaskrivir frá, at málið byrjaði í 2006, tá ið ein bussførari gjørdi vart við, at hann ikki hevur fingið frítíðarløn. Tá ið málið var kannað, vísir tað seg, at hann manglar frítíðarløn heilt aftur til 2003 umframt eftirløn, trygging og limagjald til fakfelagið.

Eftirsum bussførarin heldur ikki hevði fingið setanarbræv ella lønarlistar, hóast hetta er sáttmálaásett, tók tað drúgva tíð at staðfesta, hvør arbeiðsgevarin í veruleikanum er.

Hóast Føroya Arbeiðarafelag og sakførari felagsins støðugt hava spurt, hví Spf Suðuroyar Bygdarleiðir kravdi frídøming, so svarar sakførarin hjá felagnum og Poul Johannes Poulsen ikki fyrr enn eitt ára freistin í frítíðarlógini er farin. Mótparturin avvísti tí kravinum við grundgeving um, at málið var fyrnað. Hetta metir Føroya Arbeiðarafelag vera sera ódámligt.

Felagið stevndi og helt ikki, at fyrningarfreistin kann metast sum farin, tá ið arbeiðsgevarin tilvitað afturhelt týdningarmiklum upplýsingum um, hvør formliga stóð fyri starvssetanini. Avrátt varð tískil bæði at stevna Suðuroyar Bygdarleiðum og í øðrum lagi Poul Johannes Poulsen. Stevningin mótvegis Suðuroyar Bygdarleiðum er seinni slept.

Síðani málið byrjaði, er Frítíðargrunnurin komin upp í málið eftir áheitan frá løntakaranum, og nú hevur Poul Johannes Poulsen játtað at gjalda grunninum frítíðarlønina, sum hann noktar at gjalda løntakaranum.

Avgerð kann væntast í málinum í heyst.